# Tað er gott at búgva á Húsum

**Hetta sigur Silja, sum er av Tvøroyri. Hon flutti til Húsar fyri nøkrum árum síðani. Hon og Kristian eiga trý børn. Sosialurin fekk eitt lítið prát við tey, meðan tey tóku rabarbur upp**



*Fýra ára gamli Óli og tvey ára gamla Ása rokast her í millum allar rabarburnar*
*Mynd: Álvur Haraldsen*

PRÁT
*Solby A. Eliasen*

**Húsar:** - Tað er gott at vera her, tað er púra vist, men ein má sanniliga venja seg við tað, sigur Silja.

- Tað er sjálvandi stórur munur á at vera uppvaksin á Tvøroyri og so at flyta til Húsar, men tað havi eg vant meg við. Og tað er altíð nóg mikið at takast við her, leggur hon aftur at.

Silja vísir á, hvussu óhugaligt tað er, um hon ætlar sær at fara til Tvøroyrar ein túr.

- Tað er ein sera langur túrur at fara, tí ein nýtir ein heilan dag til at ferðast í hvønn vegin, so tað er ongin møguleiki at fara ein vikuskiftistúr til Suðuroyar.

- Tá vit eru farin ein túr suður, so hava vit altíð steðgað í eina viku – ikki minni, skoytir Kristian uppí, tí tað letur seg ikki gera at ferðast so langan veg við børnum og so bert kunna steðga ein dag.

Barsskor, sum røkir farleiðina um Kalsoyarfjørð, siglir tvær ferðir um dagin millum Klaksvík og Syðradal, sum er sunnasta bygdin á oynni. Ein túr um morgunin og ein um kvøldið.

Nógv kalsoyingar ferðast hvønn dag til Klaksvíkar at arbeiða og yvir um aftur eftir arbeiðstíð. Men tað eru tó fleiri, sum arbeiða á oynni. Eitt nú liggur ein smoltstøð hjá Faroe Salmon millum Húsar og Syðradal.

Kristian greiðir frá, at Húsa bygd er ein bygd í menning, tá tað kemur til fólkatal. Barnatalið er økt munandi seinastu árini, og tað heldur hann sjálvandi vera sera gott fyri bygdina.

- Tað setur lív í bygdina, at tað renna nógv børn úti og spæla, sigur hann.

Og tað leggur ein eisini væl merki til, tá ein gongur gjøgnum bygdina. Hendan dagin vóru heilt nógv børn at síggja úti, tí hóast sólin ikki skein, so var veðrið gott, og tað var avbera lýtt.

Meðan, vit soleiðis standa og práta um leyst og fast, gongur fýra ára gamli Óli aftur og fram við eini trillibøru. Á henda hátt hjálpir hann mammuni, sum tveitir alt, sum hon sker av rabarbunum niður í børuna.

Ása, sum er tvey ára gomul gongur eisini melur har, men hon verður eitt sindur órógvað av, at fremmant fólk kemur framvið, so hon veit ikki rættiliga, hvat hon skal. Men so at enda finnur hon eitt hvørt at spæla við og setur seg so við tí.

Níggju mánaðar gamli Jón situr bert og eygleiðir tað, sum fer fram, meðan hann jaglar eina rabarbu, sum hann hevur tikið úr baljuni hjá mammuni.

- Teimum dámar væl at vera við í tí, sum okur takast við, sigur Silja og smílist, meðan hon eygleiðir børnini.

## Ov høgur prísur

Kristian er maskinmeistaralærdur, og hann hevur verið nógv burtur. Hann sigldi við Norrønu í fjúrtan ár, men er nú farin í land.

- Tann einasti av børnunum, sum eg havi fingið ta fyrstu livitíðina við, er Jón, sigur hann og peikar á tann yngsta, sum tykist hava fingið smakkin fyri rabarbum av álvara.

- Eg var burtur í fýra mánaðir einaferð, tá Ása var um eitt ára aldur. Tá eg kom heimaftur, vildi hon slettis ikki kenna meg. Hon skríggjaði og græt, tá hon sá meg, og vildi als ikki hava nakað við meg at gera. Tað var sera hart, og tá tók eg avgerðina um, at tað var ein ov dýrur prísur at rinda fyri at vera burtur so langa tíð av árinum, greiðir Kristian frá.

Silja sigur, at tað er heilt stutt síðani, at Ása byrjaði at góðtaka pápa sín av røttum.

- Men nú rennur hon eisini allatíðina aftan á honum, sigur hon og so flenna tey.

Nú ger tann lítli vart við, at hann tímir ikki meira á hesum sinni, og Silja leggur knívin frá sær og tekur hann upp.

Beinanvegin fer Óli eftir knívinum. Eg hugsi, um eg skal gera vart við, at hann hevur tikið knívin, tí tað letur ikki til, at foreldrini varnast tað. Hann er jú einans fýra ára gamal.

Men eg velji at tiga, tá eg síggi, hvussu væl hann dugir at handfara knívin. Hann sker frá sær, og um ein skal samanbera hann við mammu sína, so stendur hann onki aftanfyri hana í skjótleika. Tað er bara eitt, tvey, trý, so er tann fyrsta rabarban grýtuklár, um ein kann siga tað so. Og hann heldur fram eina rabarbu fyri og aðra eftir.

Vit standa øll og hyggja eftir honum, meðan hann arbeiðir, og eg hugsi við mær sjálvari, at her er talan um eina familju, sum fær nógv frá hondini saman.

Vit takka fyri prátið og fara víðari í bygdini við myndini av einari familju, sum í felag var um at taka rabarbur upp til greyt og súltutoy, í huganum.



*Níggju mánaðar gamli Jón hevur fingið fatur á eini rabarbu og sær út til at dáma væl*
*Mynd: Álvur Haraldsen*



# Schrøder tekur seg inn á Stoiber

**Seinastu veljarakanningarnar í Týsklandi vísa, at sosialdemokratarnir toga seg fram á teir kristiligu demokratarnar.**

TÝSKA VALIÐ
*Árni Joensen:*

Sosialdemokratarnir hjá Gerhardi Schrøder, kanslara eru av álvara farnir at toga seg fram á kristiligu demokratarnar og kanslaravalevni teirra, Edmund Stoiber.

Fyrr í summar lógu teir kristiligu demokratarnir væl framman fyri sosialdemokratarnar, men seinastu vikurnar er munurin minkaður, og sambært teimum seinastu veljarakanningunum heldur hendan gongdin fram.

Tann seinasta kanningur vísir, at 36 prosent ætla sær at atkvøða fyri sosialdemokratunum hjá Schrøder, og at 39 prosent ætla sær at atkvøða fyri teimum kristiligu demokratunum og Edmundi Stoiber. Samanborið við seinastu kanning er talan er tvey prosent framgongd hjá sosialdemokratunum og tilsvarandi aftur-gongd hjá CDU.

Nýggja kanningin gevur Teimum Grønu, sum eru í stjórnarsamgongu við sosialdemokratunum, sjey prosent av atkvøðunum. Fríu demokratarnir, sum Stoiber ætlar at skipa samgongu saman við, fáa eftir kanningini níggju prosent.

Valið til týska samveldisdagin verður um tríggjar vikur.



*Líkt er til, at valið í Týsklandi verður meiri spennandi, enn veljarakanningar fyrr í summar bendu á. Kanska kann Gerhard Schrøder, kanslari vinna valið kortini.*

# Norskur skipari kann verða ákærdur fyri dráp

**Alt bendir á, at eitt norsk tangaskip sigldi eitt franskt fiskiskip niður mánanáttina.**

VANLUKKA
*Árni Joensen:*

Fronsku myndugleikarnir kravdu í gjár, at norska tangaskipið "Bow Eagle" skuldi koma í franska havn, tí illgruni er um, at skipið sigldi eitt franskt fiskiskip niður úti fyri strondini í Bretagne mánanáttina.

Manningin á norska skipinum viðgekk mánadagin, at skipið hevði borið við eitt ella annað um náttina, og at hol var komið á eintanga har frammi. Tað sást eisini týðiliga á skipinum, at tað hevði siglt á okkurt.

Mánanáttina sendi tann 26 metrar langi franski trolarin "Cistude" út neyðarkall 60 fjórðingar úr landi í Bretagne. Fýra av teimum sjey monnunum druknaðu. Fronsku myndugleikarnir ivast ikki í, at tað var tað 25.000 tons stóra "Bow Eagle", sum sigldi trolaran niður, og tí góvu myndugleikarnir í gjár norska skipinum boð um at koma í havn í Fraklandi. "Bow Eagle" var annars á veg til Amsterdam.

Fronsku myndugleikarnir siga, at verður tað staðfest, at norska tangaskipið sigldi tann franska trolaran niður, kann norski skiparin verða ákærdur fyri dráp.

# Danir hava friðarætlan fyri Miðeystur

**Danska stjórnin, sum hevur formansskapin í ES, hevur lagt eina nágreiniliga friðarætlan fyri Miðeystur.**

MIÐEYSTUR
*Árni Joensen:*

Danski uttanríkisráðharrin, Per Stig Møller, sum fer at leggja nýggju friðarætlanina fyri sínar starvsfelagar í hinum ES-londunum um vikuskiftið, sigur, at ætlanin er í trimum stigum. Tað fyrsta stigið umfatar tiltøk, sum skulu setast í verk undan palestinska valinum tíðliga næsta ár, annað stig snýr seg um tað, sum skal gerast aftan á valið, og triðja og seinasta stigið er sjálv fyrireikingin til eitt sjálvsstøðugt palestinskt ríki. Sambært donsku ætlanini skulu palestinar hava egið ríki í 2005.

Per Stig Møller sigur, at í hesum sama tíðarbilinum skulu ísraelsmenn og palestinar loysa trætuna um Eysturjerusalem og støðuna hjá teimum palestinsku flóttafólkunum. Samstundis skal tað endaliga markið millum Ísrael og tað komandi palestinska ríkið setast.

Danski uttanríkisráðharrin hittir í morgin sínar starvsfelagar úr hinum ES-londunum á einum fundi í Helsingør, og har fer hann at leggja donsku friðarætlanina á borðið á hotellinum Marienlyst.

Hóast ætlanin er donsk, hava embætismenn hjá uttanríkisráðnum í Keypmannahavn havt nógv samband við starvsfelagar í Týsklandi, Fraklandi og Bretlandi um ætlanina, og tað verður hildið fyri vist, at hini londini fara at taka undir við henni.

-ES eigur at nýta teir møguleikar, sum eru, og vit eiga at nýta tær fráboðanir, sum koma úr USA, til at leggja trýst á partarnar í stríðnum fyri at fáa teir at taka tær politisku samráðingarnar uppaftur, sigur Per Stig Møller.

Semjast ES-uttanríkisráðharrarnir um danska uppskotið, verður tað lagt fyri fundin, sum tann sonevnda Miðeysturkvartettin skal halda í New York tann 16. september. Í kvartettini eru ST, USA, ES og Russland.

## Danska løgreglan í andglettinum

Leiðslan á danska blaðnum Jyllandsposten er í øðini, tí løgreglan roynir at noyða blaðið til at avdúka sínar keldur í tí islamska samfelagnum í Danmark. Sum lið í sínum royndum hevur løgreglan hótt við at koyra ein av blaðmonnunum í fongsul, vil hann ikki samstarva við løgregluna.

Leiðslan á Jyllandspostinum sigur, at løgreglan hevur lurtað eftir telefonsamrøðum hjá í hvussu er einum av blaðmonnunum á blaðnum fyri at fáa at vita, hvaðani hann hevur tær upplýsingar, sum hann hevur nýtt í greinum um viðurskiftini millum jødiskar og palestinskar bólkar í Danmark.

Ein dómari hevur gjørt av, at Jyllandsposturin skal upplýsa, hvørjar keldurnar hjá blaðnum eru, men tað vil blaðið ikki. Sambært úrskurðinum hjá dómaranum kann blaðmaðurin fáa bót, men hann kann eisini enda í fongsli.

Jørgen Ejbøl, blaðstjóri á Jyllandspostinum, sigur, at mannagongdin, sum løgreglan nýtir, er einki annað enn valdsmisnýtsla, sum als ikki kann góðtakast í einum demokratiskum samfelagi. Hann heldur, at løgreglan misnýtir dómsvaldið fyri at fáa fatur á upplýsingum, sum løgreglan ikki megnar at fáa fatur á sjálv.

## Meiri pengar til kjarnorku

ES-nevndin hevur skotið upp at játta umleið 15 milliardir krónur eyka til kjarnorku. Pengarnir skulu latast sum lán.

Úr Bruxelles verður sagt, at meginparturin av pengunum er ætlaður kjarnorkuverkætlanum í teimum eysturevropeisku londunum. Eitt nú hevur ES fyrr latið pengar til at bøta um trygdina á fleiri kjarnorkuverkum í Russlandi, Bulgaria og í Ukraina.

Nýliga hevur Rumenia biðið ES um fíggjarliga hjálp til eitt nýtt kjarnorkuverk, sum landið ikki megnar at gera liðugt. Sambært keldum í Bruxelles standa fleiri kjarnorkuverk í Ukraina, Bulgaria, Russlandi og Slovakia eisini í hálvum gekki orsakað av vantandi fígging.

## Hvarv 11. september - funnin aftur á lívi

Tann 46 ára gamli amerikanarin George W. Sims var millum teirra, sum amerikansku myndugleikarnir skrásettu sum deyð í yvirgangsatsókni at World Trade Center tann 11. september í fjør. Maðurin arbeiddi í øðrum torninum og kom ikki afturíaftur.

Men nú er hann brádliga komin afturíaftur. Tað vísir seg, at George W. Sims fekk stóran skaða í atsókni, og at hann varð fluttur á sjúkrahús í New York, og har hevur hann verið síðani.

Skyldfólk hjá George W. Sims siga, at hann hevur mist minnið, og at hann kennir ongan av sínum næstu aftur.

90 fólk, sum arbeiddu í World Trade Center, eru framvegis skrásett sum horvin.